# Kjak



Nicolina Jensen Beder

## Misskiljing

Vegna lýsing í bløðunum um bøkurnar »At loysa úr lagdi«, ið eru lýsingar um bygdasøguna »Innan Glyvur«, er ein ávís misskiljing komin í vegna heitið. Í mong ár hevði eg undirvísing í Tórshavnar Kvøldskúla við heintum »Loyst úr lagdi«. Mong vita, at eg eri við at geva eina bók út og trúgva tí, at hetta er bókin. Fólk ringja og spyrja, um bókin nú er komin. Tey fáa hetta svarið:

Bókin hjá mær fær heitið »Seyður. Ull. Tøting« og kemur út síðst í hesum mánað. Umframt at innihaldið svarar til heitið, er ein heildarfrásgn um seyð í Suðuroynni við myndum frá Akrabyrgi til Sandvíkar. Sprotin gevur bókina út.



Kári á Rógvi løgtingsmaður
*formaður Sjálvstýrisfloksins*

## Á lógligan og fullgóðan hátt

**Vit ið vald eru á ting mugu taka støðu: vilja vit hava sakliga og óhefta fyrisiting, ella vilja vit framhaldandi tilvild og vinarpolitikk, har ið "babba telur mest"?**

Hvat skal til at gerast løggildur grannskoðari, er ikki stóri spurningurin í hesum døgum. Tann spurningurin er tíverri merktur av vanliga vantandi áhuganum fyri løgmálum. Vit mangla nóg tryggar karmar um óheft embætisverk at tæna fólkinum og skipanini heldur enn politikarum.

At reglurnar mangla og onki hendur, er tó ikki bara, tí áhugin manglar. "Umboðsmaðurin heldur, at síggjast kann ikki burtur frá, at gongdin í arbeiðinum at gera eina kunngerð... hevði tilknýti til viðgerðina av ítøkiligu málunum," stendur at lesa í frágreiðingini. At reglur mangla gevur høvi til at tulka henda veg og handa veg, tá ið hetta passar politiska valdinum.

Annika Olsen hevur lagt sera stranga linju í mun til gøluna í Hovi, hevur koyrt stjóra til hús og ætlar at fara undir ta kanning, sum vit fánýtis hava biðið um á tingi. Hon má nú taka støðu til, at sagt verður um "aðalstjórin í Innlendismálaráðnum var ógegnigur ... Umboðsmaðurin heldur, at [avgerðir] tí mugu metast at vera ógilduga[og] heldur seinnu kæruviðgerðina vera serstakliga atfinningarsama [og] heldur somuleiðis handfaringina hjá ráðnum av eini kæru um stjóran av Skráseting Føroya vera atfinningarsama."

Í báðum hasum málunum er tó ávís rúmd fyri frágreiðingum. Men her krevjast veruliga góðar frágreiðingar, og tær treyta helst sera væl skipaðar og óheftar kanningar.

Men støðan er nógv verri enn so. "Umboðsmaðurin heldur talan vera um ósakliga fyrisiting í Vinnumálaráðnum, tí bæði embætisfólk og landsstýrismaðurin í vinnumálum settu seg í fleiri førum í samband við Skráseting Føroya um málið og luttóku á fundi við umsøkjararnar um kærurnar," verður sagt um umsitingina av vinnumálum.

### Hvat er hegni, vit tá vert?

Her tykist framdur verða nakin vina- og kenningapolitikkur. Prógvini eru somikið greið og sannførandi, og málið so løgfrøðiliga einfalt, at fyrrverandi varaløgmaður helst eigur at sleppa at verja seg við eitt nevningating eftir lóg um ábyrgd landsstýrisins; í øllum førum, um ikki kanningar, sum kunnu vísa nakað annað, verða settar í verk straks.

Eisini fyrrverandi løgmaður má greiða frá, hvussu hetta hendi á hansara vakt. Hann hevði skyldu eftir stýrisskipanini at ansa eftir, "at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt." Hvussu kundi hann, sum sjálvur var kunnaður um málið og flutti tað úr vinnumálaráðnum vegna ógegnis, ikki gáa eftir, hvat síðan hendi?

Hinir myndugleikarnir: verandi løgmaður, landsstýrismálanevnd og løgtingsformaður plaga øll at hava undanførslur fyri, hví tey onki gera við eftirlitisvaldið. Men vit mugu krevja aðra vend. Frágreiðingin hjá umboðsmanninum kemur inn á fortreytirnar fyri at broyta siðvenju; nú má politiska skipanin sýna, hvat "*á lógligan og fullgóðan hátt*" merkir!



Frants Jensen
*Fuglafjørður*

## Vit hava ikki ráð at hjálpa!

Nú kom endiliga ein sending aftur í Kringvarpið, sum vísir føroyskt hjálpararbeiði úti í heimi.

Sendingin hevði fingið heitið "Út um øll mørk", og var um nakrar næmingar úr Tekniska Skúla í Havn, sum vóru farnir til Rumenia at hjálpa. Føroysku næmingarnir løgdu vatn inn í nøkur hús og umvældu nøkur onnur hjá tí sera, sera fátæka romafólkinum. Vit hoyrdu eisini døpru søgurnar hjá nøkrum av familjunum.

Kringvarpið skal hava rós fyri at senda eina tílíka sending. Vit føroyingar hava brúk fyri at síggja og hoyra nógv fleiri tílíkar søgur.

Sendingin kundi eisini havt ein annan vinkul við, tí millum romafólkið hevur longu verið gjørt eitt sjálvboðið føroyskt hjálpararbeiði.

Vit hava í Føroyum fleiri sjálvbodnar felagsskapir og einstaklingar, ið hava gjørt og framvegis gera eitt stórt hjálpararbeiði millum tey fátøku í Rumenia. Eisini eru nógvir føroyskir felagsskapir og einstaklingar, ið hava gjørt og framvegis gera eitt stórt hjálpararbeiði í nógvum øðrum fátøkum londum úti í heimi.

Hesi skulu hava eina stóra tøkk fyri teirra ósjálvsøkna arbeiði, og at tey seta Føroyar á heimskortið, tá ið tað ræður um at hjálpa teimum, ið veruliga hava hjálp fyri neyðini.

Sambært hagtølum hjá Heimsbankanum liva 1,4 milliard fólk í heiminum í dag sum ógvuliga fátøk. Tað svarar til, at tey hava minni enn 1 dollara (undir 6 krónur) um dagin at liva fyri. Nógv av hesum ógvuliga fátøku fólkunum liva í Afrika og Asia, men tey eru eisini í stórum tali í Evropa og í USA.

ST hevur sett sær um mál at hjálpa hesum fátækastu av teimum fátækastu. Málið er at minka heimsins fátækradømi við eini helvt í 2015.

Men tá ið tað kemur til okkara føðiland, so er boðskapurin ein heilt annar. Nevniliga hesin: "Vit hava ikki ráð at hjálpa!"

Síðani 2005 hevur Føroyar latið 3 milliónir krónur um árið í menningarhjálp. Hesin peningur er nýttur til ymiskar verkætlanir fyri at hjálpa nøkrum av teimum allar fátækastu úti í heimi. Í nøkrum av hesum verkætlanunum hava føroyingar beinleiðis verið knýttir at og í øðrum førum ikki.

Men nú fíggjarætlanin er løgd fram, er ætlanin at skerja játtanina, so at vit sum land bara skulu lata 2 milliónir krónur í meningarsamstarvi. Vit hava altso ikki ráð at lata eina upphædd um árið, sum svarar til 60 krónur pr. føroying. Vit mugu lækka játtanina niður á 40 krónur pr. føroying. Og hetta eru vit, sum liva í einum av heimsins ríkastu londum.

Hvussu skal tað vera, um øll onnur lond gjørdu eins og Føroyar. Nær kemur so heimsins fátækradømi niður í helvt? Og sum nú er lata vit enntá bara 0,03 prosent av bruttotjóðarinntøkuni, meðan ST tilmælir 0,7 prosent. Hetta er á leið upphæddin, sum fleiri av okkara grannalondum eisini lata.

Eg skammist av at vera føroyingur! At vit bera henda boðskapin út til heimsins allar fátækstu lond, at vit hava ikki ráð at hjálpa teimum. Vit hava ikki ráð at hjálpa teimum við heilivági, ið annars kann bjarga í túsundatali av mannalívum. Vit hava ikki ráð at læra og undirvísa teimum innan heilsu, reinleika, ella hjálpa teimum at fáa reint vatn. Vit hava ikki ráð at hjálpa teimum við skúla og útbúgving. Vit hava ikki ráð at hjálpa teimum til eitt betri lív!

Tíbetur sær út til at glógva í onkrum politikara, sum nú royna at virka fyri, at játtanin ikki verður skerd. Eg vóni, at politikararnir gera langtíðarætlanir og við tíðini hækka menningarhjálpina. So hevði eg eisini verið ernari av at veri føroyingur. Men sum nú er skammist eg.

Ein setningur rungar í høvdinum, sum ein av næmingunum á Tekniska Skúla segði eftir teirra upplivingar í Rumenia:

"Eg fari ikki at oyðsla so nógv, sum eg havi gjørt áður, nú eg havi sæð, at nøkur ikki hava eina krónu at liva fyri".




Altíð tað nýggjasta